# Fekk okkum at spæla

**Jens Kristian Hansen hevur sjálvur alt gott at bera Allani Simonsen, sum hann heldur hava stóran part av ábyrgdini fyri leikligu framgongdina, sum landsliðið hevur havt**

*Tá eg ikki havi havt forfall, havi eg verið við hvørja ferð, og eg eri ongan tíð settur á beinkin, so eg skal so ikki klaga um nakað, sigur Jens Kristian Hansen*



EFTIRMETING
*Jákup Mørk*

Ein hin fyrsti leikarin, sum Allan Simonsen tók inn á føroyska landsliðið, tá hann gjørdist venjari, var Jens Kristian Hansen, sum tá var 22 ára gamal.

Nú átta ár seinni ber til at staðfesta, at júst Jens Kristian er ein av leikarunum, sum hevur havt treytaleyst álit frá landsliðsvenjaranum, og sæð í ljósinum av hesum er tað heldur ikki løgið, at skoðsmálið frá verjuleikaranum fyri tað mesta er positivt.

- Fyrst og fremst haldi eg, at hann fekk føroyska landsliðið at leggja størri dent á fótbóltsspælið, heldur enn sparkarí, og ein av orsøkunum til, at hetta lat seg gera, var at hann altíð er sera væl fyrireikaður. Tað er næstan altíð soleiðis, at mótstøðuliðini hava spælt akkurát soleiðis, sum hann hevur sagt undan dystinum, og tí hevur taktiska uppleggið aloftast verið sera beinrakið, sigur Jens Kristian um nú fyrrverandi landsliðsvenjaran.

- Nakað annað er so tað, at hann helst hevur verið ov lítið í Føroyum, og tískil ikki hevur sæð nóg nógv til teir heimligu leikararnar, heldur Jens Kristian.

### Kanska tiltrongt

Tá vit at enda spyrja Jens Kristian, um tann tíðin var komin, har tað var neyðugt við einum nýggjum venjara, heldur hann fyri, at tað var tað kanska.

- Allar helst er tað eitt gott hugskot at taka hetta stigið nú. Spurningurin er kanska eisini, hvussu nógv afturat hann hevur at geva okkum, og kanska vildu summir av leikarunum eisini, at eitt skifti skuldi fara fram.

- Ikki tí. Eg havi sjálvur havt alt gott at bera honum. Tá eg ikki havi havt forfall, havi eg verið við hvørja ferð, og eg eri ongan tíð settur á beinkin, so eg skal so ikki klaga um nakað, sigur Jens Kristian Hansen at enda.

# Fyrireiking og fyrireiking

**Hjálparvenjarin heldur ikki, at fakligi førleikin var sterkastas síðan hjá landsliðsvenjaranum, men hinvegin leggur hann áherslu á, at Allan Simonsen hevur lært føroyingar, hvussu mann fyrireikar seg til altjóða dystir**

EFTIRMETING
*Jákup Mørk*

Seinastu seks av teimum áttu árunum, sum Allan Simonsen hevur verið føroyskur landsliðsvenjari, hevur Jógvan Martin Olsen av Toftum verið hjálparvenjari.

### Hevur lært okkum nógv

Tí er hann kanska tann persónurin, sum hevur verið mest knýttur at Allani Simonsen, og tá vit mánamorgunin spurdu hann, hvat hetta hevði givið honum, sigur Jógvan Martin, at tað fyrst og fremst er í fyrireikingararbeiðinum, at styrkin hjá Allani hevur ligið.

- Sjálvandi hevur hetta givið mær eitt innlit í landsliðsarbeiði, sum eg annars ikki hevði havt, men men fyrst og fremst haldi eg, at Allan hevur lært okkum at hyggja øðrvísi at teimum avbjóðingum, sum altjóða fótbóltur gevur okkum.

- Hann hevur alla tíðina lagt sera stóran dent á fyrireikingarnar, og her hevur einki verið latið til tilvildina. Hetta hevur gjørt, at órógvandi elementini í landsliðsarbeiðinum hava verið ógvuliga fá. Hvør einasti persónur í ferðalagnum hevur kent sína uppgávu, og við at leggja alt í slíkar rutinur, hevur hann lyft fyrireikingarnar upp á eitt nógv meira professionelt støði.

- Til dømis kann nevnast fyribrigdið, tá leikarar hava onkrar smávegis snuddir. Í Føroyum er tað aloftast soleiðis, at tú tá sigur venjaranum frá, fyri at vita, hvat skal gerast. Her havur Allan alla tíðina havt ta greiðu støðu, at hetta er ikki hansara borð. Er leikari skaddur, re tað lækni og fysioterapeutur, sum tú skalt tosa við, og soleiðis hevur tað verið í øllum viðurskiftum kring liðið.

### Fakligi førleikin

Sjálvur hevur Jógvan Martin tikið tey venjaraskeiðini, sum FSF í samstarvi við DBU hevur boðið føroyskum venjarum, og spurdur, um Allan eisini hevur givið sær fakligan íblástur, sigur Jógvan Martin, at tað hevur verið í nógv minni mun.

- Nú er tað avmarkað, hvørjar royndir eg havi sum venjari, men eg haldi meg kunna siga, at tað ikki var á hesum økinum, at styrki hansara lá. Tað var nú heldur ikki nakar veikleiki, men styrki hansara lá avgjørt í fyrireikingunum, og eg haldi heilt víst, at framgongdin, sum Føroyar hava havt seinnu árini fyrst og fremst er íkomin, tí leikararnir hava verið nógv betri fyrireikaðir.

- Sjálvsagt eru leikararnir eisini betri fyri nú, men hetta er eitt arbeiði, sum verður gjørt úti í feløgunum, tó at Allan eisini hevur viðvirkað til, at fótbóltsárið hjá okkum er longt við hálvum øðrum mánaði hesi árini.



*eg haldi heilt víst, at framgongdin, sum Føroyar hava havt seinnu árini fyrst og fremst er íkomin, tí leikararnir hava verið nógv betri fyrireikaðir, sigur hjálparvenjarin seinastu seks árini*

At enda spurdu vit Jógvan Martin, um hann hevði nøkur góð ráð til FSF, nú teir skulu til at leita sær eftir nýggjum venjara, men tí spurninginum helt komandi NSÍ-venjarin seg langt burtur frá at svara.

- Handan spurningin haldi eg, at tú skalt seta onkrum øðrum persóni, segði Jógvan Martin Olsen at enda.

# Fekk skil á

**Magni Jarnskor heldur, at største broytingin, tá Allan Simonsen gjørdist landsliðsvenjari, var, at allir karmar kring liðið gjørdist meira professionellir**

EFTIRMETING
*Jákup Mørk*

Ein teirra, sum var við, tá føroyskur fótbóltur trein inn á altjóða pallin í 1988, og sum eisini var við, tá skiftið fór fram á landsliðsvenjarasessinum, er Magni Jarnskor, sum eisini hevði tann heiður at vera liðskipari í fleiri av dystunum hjá føroyska landsliðnum.

### Gekk høgt upp í smálutirnar

Um tær broytingar, sum fóru fram á liðnum, sigur Magni, at tað fyrst og fremst var virðingin fyri venjaranum, sum varð størri, og so nevyleikin, sum Allan Simonsen legði í fyrireikingarnar.



*tú vildi veruliga gera títt ítarsta til at sleppa at arbeiða saman við einum slíkum leikara, sigur Magni Jarnskor millum annað um Allan Simonsen*

- Hann fekk hetta vanliga føroyska sløsaríið burtur. Eg minnist onkrar av fyrstu ferðunum, sum vit vóru, har onkur leikari kom nakrar minuttir ov seint til onkran fund. Hetta kundi hann slettis ikki góðtaka, og tað fingu spælararnir so sanniliga eisini at vita.

- Eisini gekk hann sera høgt uppí, at leikararnir vóru so væl fyri sum gjørligt. Føroyingar hava tað ofta soleiðis, at vit fara at keypa og soleiðis. Tá hann kom til, var tað slutt við hesum. Frítiðin varð nýtt til at hvíla í, og eisini syrgdi hann fyri, at matur og annað var í lagi. At hann hevur verið við so leingi, gjørdi eisini, at tú lurtaði eftir manninuim, tí tú vart greiður um, at maðurin visti, hvat hann tosaði um.

### Motiverandi

At enda spurdui vit Magna, hvussu tað kendist, tá hann afturi í 1994 fekk at vita, at Føroyar høvdu fingið Allan Simonsen at venja landsliðið.

- Tað ljóðaði heilt fantastiskt, at ein somikið stórur leikari, sum eisini hevði verið tann besti í Europa, skuldi gerast venjari hjá okkum.

- Tað var veruliga nakað, sum fólk løgdu til merkis, og fyrstu tíðina haldi eg eisini, at hetta var eyka motiverandi fyri leikararnar, tí tú vildi veruliga gera títt ítarsta til at sleppa at arbeiða saman við einum slíkum leikara, sigur Magni Jarnskor at enda.



Kyndil-Neistin 23-24 (13-10):

# Heppin grannasigur

**Tað eydnaðist Neistanum at vinna væntaða sigurin í lokaluppgerðini, men tað er einki at siga til, um kyndilsmenninir vóru vónbrotnir, tá tað ikki eydnaðist teimum at halda fast um sigurin**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Nýggjar tíðir eru í føroyskum hondbólti, og ein avleiðing av hesum er tann sannroynd, at tað ikki longur kann roknast fyri ein sjálvfylgja, at leikarar støðast í sama felagið ár eftir ár.

Kanska eru bestu dømini um hetta júst tey bæði havnarfeløgini. Neistin hevur í øllum førum trivist væl við nýggju gongdini, og tað er neyvan at taka munnin ov fullan, um sagt verður, at gullmerkið fyri hálvum øðrum ári síðani ikki hevði komið til høldar uttan fólk aðra staðni frá.

Hjá Kyndli hevur gongdin fyri tað mesta verið júst hin øvugta, og undan hesum kappingarárinum hevur liðið sæð fleiri av stinnastu leikarunum sínum leita sær til onnur feløg at spæla hondbólt.

Soleiðis vóru ikki færri enn tríggir leikarar á neistaliðnum sunnudagin, sum áður hava roynt seg í Kyndli, og hetta var í øllum førum ein av orsøkunum til, at Neistin hesa ferð mátti roknast sum favorittur í lokaluppgerðini.

### Kyndil var betri

Fyrstu longu løtuna av dystinum sást tó millum lítið og einki til, at tað eftir bókini skuldi vera Neistin, ið var hitt betra liðið.

Neistaliðið hevur kanska størri nøvnini av grannunum báðum, men tað er nú eina ferð soleiðis, at dystirnir skulu spælast, áðrenn stigini verða býtt, og hetta tóktust neistamenninir als ikki at hava sansað sunnudagin.

Her kundu teir lært nakað av mótstøðuliðnum, tí hvør tann einasti leikarin á kyndla-liðnum tóktist frá fyrstu løtu at vera sera uppsettir. Við ágrytnum verjuspæli syrgdu teir fyri, at Neistin ongan tíð fekk frið at koyra tungu kanónirnar í skotstøðu, og haraftrat gav hetta eisini fleiri skjótálop, sum í allar flestu førunum góvu úrslit.

Trý mál vóru soleiðis á muni í hálvleikinum, men í veruleikanum var hetta buldrandi órættvíst, og í Neistanum munnu teir prísa sær lukkuliga fyri, at at Jacob Jónsson mest sum einsamallur megnaði at fylgja so dánt við Kyndli. Íslendingurin tók ferð eftir ferð ábyrgd í annars tannleysa álopinum, og sum skotini hjá honum sótu, kundi sjálvt ikki tann annars sera væl spælandi Lars Black gera nakað við tey.



*Hans Áki Dal-Christiansen slapp fyri fyrstu ferð at royna seg ímóti Kyndli, og parturin hjá altíð stríðsfýsna vongspælaranum lá so ikki eftir*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Dýrur missur

Í seinna hálvleiki var eisini líkt til, at gongdin frá fyrra hálvleiki skuldi halda fram.

Kyndil helt á við sama ágrýtna spælinum, og eftir tá munurin var størstur, høvdu teir vunnið seg upp á 16-11, men tá raknaði Neistin brádliga við.

Heini Joensen, sum annars hevði verið ein skuggi av sær sjálvum, skoraði tvey mál á rað, og tað tóktist, sum um hetta var startskotið til liðfelagarnar. Brádliga gjørdist verjan meira livandi, álopsspælið gekk skjótari, og hjá Kyndli var nú greitt, at teir máttu stríðast av øllum alvi, um teir skuldu halda fast um leiðsluna.

Tað var tó ein dyggur smeitur hjá Kyndli, at teir júst um hetta mundi mistu Janus Einar Sørensen. Strikuspælarin, sum nú er liðskipari, var óheppin í einum falli, og tað skuldi vísa seg, at hesin missur gjørdist ov tungur fyri Kyndil.

Fyrstu ferð, at Neistin var á odda í dystinum, var tá Heini skeyt teir upp á 18-17, og hóast Kyndil enn eina ferð megnaði at svara aftur, os tóktist tað tá soleiðis, at Neistin hevði týdningarmiklu sálarligu yvirvágna. Tað var tó nær við at kosta teimum sera dýrt, at teir ikki í nóg stóran mun kundu gera sær dælt av yvirtali, tá Kyndil eina løtu hevði tveir mans úti.

Ístaðin kom Kyndil upp aftur á javnleik, 23-23, men í sínum seinasta álopi eydnaðist Neistanum at skora, og tá teir so eisini megnaðu at halda fast í verjupartinum seinastu sekundini, kom sigurin hóast alt til høldar.



*Eini grannauppgerð líkt, so var talan um hópin av nærdystum í dystinum. Her eru bæði Hanus Kúrberg og Elmar Ósá komnir niður á jørðina, men framvegis hevur verjuspælarin fatur í manni sínum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Einstaklingaavrik

Talan var um næsta av tveimum møguligum sigrum hjá Neistanum, og sjálvandi er hetta nakða, sum eigur at geva gott móti í bláu leguni.

Tað skerst tó ikki burtur, at talan í báðum førum hevur verið um teprar sigrar, og tú finnur neyvan nakran áskoðara, sum heldur Neistin vera óhepnan við at hava fingið fýra stig higartil.

Tað tykist í løtuni soleiðis, at hóast liðið ikki er nóg væl samanspælt, so eru einstaklingarnir somikið sterkir, at hesir kunnu avgera dystin sjálvir. Sum nevnt, so var Jacob Jónsson orsøkin til, at Neistin ikki varð afturúrsiglt longu í fyrra hálvleiki, men eisini í seinna hálvleiki sýndu íslendingurin sítt virði. Millum annað skeyt hann fýra av teimum fimm seinastu málunum, og tað ber í øllum førum boð um ein leikara, sum ikki er bangin um at taka ábyrgd á seg.

### Nógv at byggja á

Í Kyndli er einki at ivast í, at menn iðra seg um tapta dystin móti grannunum, men hinvegin er heldur einki at ivast í, at bæði venjari og leikara eiga at finna nógvar lutir í dystinum, sum eru verdir at hava í huga til komandi dystirnar.

Ikki minst verðru tað týdningarmikið, at liðið framhaldandi sýnir eins góðan vilja á vøllinum. Viljin kann bera liðið langt, tí hóast talan í stóran mun er um ungt fólk, so er talentið til staðar í ríkiligt mát. Høgni Klein er veruliga vaksin við uppgávuni hetta kappingaárið, og tað sama má eisini sigast um Lars Blak, sum higartil hevur loyst skadda Johan Danielsen av.

Verjuparturin er eisini hampuliga sterkur, og megnar liðið at halda fast um og menna hendan partin eisini, er als ikki óhugsandi, at liðið fer at spæla okkurt puss við nøkur av teimum liðum, sum hava ætlað sær ein leiklut í oddinum hetta árið.

### Dysturin í tølum:

**Kyndil-StÍF 23-24 (13-10):**
Málskjúttar:
Kyndil: Jónleif Sólsker 8(3), Leif Mikkelsen 5, Janus Einar Sørensen 3, Ragnar Simonsen 2, Høgni Klein 2, Niels Viggo Niclasen 2, Gunnar Wardum 1
Neistin: Jacob Jónsson 10(1), Ári Rouch 3, Kári Mortensen 3, Hans Áki Dal-Christiansen 3, Finnur H. Petersen 1, Elmar Ósá
Brotskøst: Kyndil 3, Neistin 4
Útvísingar: Kyndil 10, Neistin 4
Dómarar úr StÍF: Pole Hansen og Jústines Justinussen.